


*Jóannes Eidesgaard, fíggjarmálaráðharri, legði uppskotið um fíggjarlóg fyri 2011 fyri Tingið í gjár og helt løtu seinni tíðindafund í Fíggjarmálaráðnum*
Mynd: Jens Kristian Vang

# Hava roknað við tilfeingisgjaldi

**Ein av nýggju inntøkunum hjá landinum er eitt tilfeingisgjald álagt fiskiflotanum og alivinnuni, men sambært fíggjarmálaráðharranum vóru øll fyrireikað upp eitt slíkt gjald**

Leo Poulsen

Gjáramorgunin legði Jóannes Eidesgaard, fíggjarmálaráðharri, uppskotið til fíggjarlóg fyri 2011 fram.

Uppskotið vísir eina inntøku á 4.268 milliardir og eina útreiðslu á 4.775 milliardir, og tað gevur eitt undirskot á 506,5 milliónir.

– Fíggjarlógaruppskotið stavar frá einari samanrenning millum sparingar á útreiðslusíðuni og eini batnandi búskapargongd, sigur Jóannes Eidesgaard.

Fíggjarmálaráðharrin sigur, at hetta er fyrstu ferð, at eitt fíggjarlógaruppskot er so væl skipað.

– Ráðini fingu longu í apríl at vita, hvørjir karmarnir hjá ráðnum vórðu, og so var tað upp til ráðini sjálv at syrgja fyri, at hesir karmarnir vórðu hildnir, sigur Jóannes Eidesgaard.

Uppskotið byggir annars á fýra grundleggjandi fyritreytir:

- At føroyski búskapurin spakuliga er á veg upp eftir
- At skattur og avgjøld eru vaksandi
- At vinnan hevur havt vánaligari úrslit seinastu árini og at hetta ávirkar fíggjarlógina negativt
- At hetta tó gevur eitt betri úrslit samanlagt

Jóanns Eidesgaard vísti á, at tað verður neyðugt at tálma útreiðslurnar og vaksa um inntøkurnar.

## Tølini

**Høvuðstølini í uppskotinum er hesi:**

Inntøkur:
- skattur 1.994 mia
- avgjøld 1.639 mia
- heildarveiting 635 mió

Hetta gevur eina inntøku tilsamans á 4.268 mia

Útreiðslur:
- rakstur 4.529 mia
- løgur 208 mió
- renta 38 mió

Útreiðslur tilsamans 4.775

Við justeringum merkir hetta, at undirskotið á fíggjarlógaruppskotinum fyri 2011 er 506,5 milliónir krónur, sammett við undirskotið á verandi fíggjarlóg á 770 milliónir.

– So hóast talan er um undirskot, er hetta kortini eitt stig á rættari leið, metir Jóannes Eidesgaard.

**Íløgurnar fyri 2011 eru hesar:**

- Skúladepilin í Marknagili 41 mió
- Útbygging á Landssjúkrahúsinum 29 mió
- Almenir bústovnar 34 mió
- Vegaføring Leirvík 18 mió
- Viðareiðisvegurin 5 mió
- Ítróttahøll á Sandoynni 10 mió
- Havrannsóknarskip 5 mió

## Samd um uppskot

Í fíggjarlógaruppskotinum verður eisini lagt upp til nýggjar inntøkur. Eitt umhvørvisgjald skal leggjast á allan oljuinnflutning, vinnan skal gjalda tilfeingisgjald og barsilsgjaldið skal økjast.

Tíggju oyru á hvønn innfluttan litur av olju og oljuúrdrátti skal geva landskassanum 40 milliónir. Her er talan um alla oljunýtslu í landinum, men er ikki galdandi fyri oljuveitingar, ið verða nýttar uttan fyri landgrunnin, tað vil siga útlendsk og føroysk skip, ið royna uttan fyri føroyska landgrunnin.

Eisini verður eitt tilfeingisgjald lagt á fiksi- og alivinnuna. Hetta skal geva 25 milliónir tilsaman býtt við 18 milliónum á alivinnuna og sjey milliónur á fiskivinnuna. Saman við økta barsilsinngjaldinum gevur hetta tilsamans 73,5 milliónir krónur eyka í landskassan.

Ymsar aðrar sparingar skulu geva hundrað milliónir krónur, og boðað var frá, at allar almennar lønarhækkingar verða mótroknaðar í uppsagnum.

– Hvørt ráð sær hevur viðgjørt uppskotið og flokkarnir eru eisini greiðir um høvuðstølini í uppskotinum, og tí rokni eg við, at viðgerðin í fíggjarnevndini ikki broytir tað stóra, sigur Jóannes Eidesgaard.

Sjálvandi kann roknast við justeringum í fíggjarnevndini, men fíggjarmálaráðharrin roknar við, at uppskotið fyri fíggjarlóg 2011 verður samtykt meiri ella minni óbroytt í Løgtinginum.